

## Ótrygt at flúgva í Afrika

Hóast flogferðirnar yvir afrikanskari jørð eru bara fýra prosent av øllum flogferðum í heiminum, hendir triðja hvør flogvanlukka har. Tað kom fram á einari ráðstevnu um flogtrygd, sum hevur verið í vesturafrikanska landinum Togo teir seinastu dagarnar. Á ráðstevnuni samdust londini um at leggja størri dent á trygdina og at samstarva, tá vanlukkur skulu kannast. Umboðini vóru á einum máli um, at nógv flogfør, sum flúgva í Afrika, eru ótíðarhóskandi, viðlíkahaldið er ikki nóg gott, og trygdarreglur verða ikki fylgdar. Harafturat er tilbúgvingin í sambandi við vanlukkur ikki nøktandi.

# sólskinssøga




*Í 2003 varð Vaðhorn Seafood kosið at vera ársins virki, og hetta hava leiðsla og arbeiðsfólk annars rættiliga livað upp til*

hjálpa okkum, tá á stendur.

Umsitingarleiðarin sigur, at nú eftir summarfrítíðina var heldur minni at gera, og soleiðis er, tá tað er saltfiskur, sum skal liggja í salti, áðrenn hann verður pakkaður.

- Fiskasløgini, vit keypa og arbeiða, eru toskur, longa og brosma, og kanska telir toskur største triðingin, tá árið er úti.

Eitt ár, sum í ár, væntar Jens Kristian Rasmussen, at Vaðhorn Seafood kemur at keypa og virka stívliga 3.500 tons av ráfiski.

### Riggar væl

Jens Martin Knudsen hevur seinastu árini verið virkisleiðari á saltfiskavirkinum á Hulki.

- Vit royna í størst møguligan mun at tillaga okkum til umstøðurnar hjá fólki, tá vit arbeiða í skiftivaktum. Kvinnur, sum eiga børn, arbeiða í dagvaktunum, men kunnu altíð skriva seg upp á listan til kvøldvaktir, um tær kortini ynskja tað.

Virkisleiðarin sigur, at Vaðhorn Seafood í eini tvey ár hevur upplært nógvan ungdóm, sum tekur hond í, tá nógv er at gera.

- Tað er nú einaferð soleiðis, at eini 10-15% av arbeiðsfólkinum koma og fara, og tí havi eg sæð týdningin av, at tey, sum eru á virkinum, hava ein ávísan førleika.

Hann sigur, at eini 20 næmingar úr 10. flokki arbeiða á virkinum, tá nógvur fiskur er, og vanligt er, at hesir arbeiða týsdag, mikudag og hósdag – til klokkan 19.

- Vit skipa so fyri, at arbeiðið ikki gongur út yvir skúlan, og tí koma næmingarnir vanliga eftir skúlatíð og fara heimaftur betýðs.

Jens Martin ásannar, at hetta stig at taka skúlanæmingar til arbeiðis, hevur havt stóran týdning – fyri báðar partar.

- Hetta er soleiðis eitt stig, sum gevur skúlaungdómi ein møguleika at tjena sær nakrar krónur, samstundis sum vit hava fólk í framleiðsluni, sum veit, hvørjar uppgávurnar eru. Á henda hátt hava vit at kalla einki púrasta óroynt fólk í framleiðsluni – uttan, tá nýggir næmingar byrja her hjá okkum og fáa sína upplæring, sigur virkisleiðarin.

### Størri orka

Saltfiskavirkið á Hulki hevur við eini útbygging á umleið 1100 fermetrar økt munandi um framleiðsluorkuna og hevur soleiðis eisini fingið betri virkisumstøður.

- Vit hava bygt ein tilbygning, sum er tikin í nýtslu í ár, og her hava vit ráfiskagoymslu og alla skering. Eisini hava vit fingið uppaftur betri frystimøguleikar, soleiðis at vit kunnu keypa størri nøgdir og soleiðis eisini hava eina størri og støðugari veiting til okkara viðskiftafólk úti í heimi, sigur Jens Martin Knudsen, virkisleiðari á Vaðhorn Seafood.



*Jens Martin Knudsen, sum vit serliga kenna úr landsliðsmálinum, er virkisleiðari á Vaðhorn Seafood*



*Nógv bendir á, at Jan Højgaard fær trý ár aftrat sum umboðsmaður fiskimanna*
ynd: Vilmund Jacobsen

## Enn er eingin avbjóðari

**Um einki valevni hevur meldað seg hin 4. desember klokkan 16, sum er evsta freist til uppstilling í Føroya Fiskimannafelag, verður felagsformaður sitandi í eitt skeið aftrat**

VALÁR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár vóru júst tríggjar vikur eftir, til tíðin at stilla upp til felagsformansvalið í Føroya Fiskimannafelag er úti

Jan Højgaard, felagsformaður, sigur, at enn hevur eingin avbjóðari meldað seg, og enn hevur felagsskrivstovan heldur ikki fingið nakra fráboðan um, at nakar listi er á veg.

Treytin fyri at gerast valevni er, at tú hevur fimm stillarar, sum eru skipsmanningar ella sóknir.

Hetta merkir, at tú kanst hava fimm skipsmanningar aftanfyri teg – ella 5 sóknir. Tú kanst eisini hava tríggjar skipsmanningar og tvær sóknir – ella øvut.

Hevur einki valevni meldað seg hin 4. desember klokkan 16, sum er evsta freist til uppstilling, verður verandi felagsformaður sitandi í eitt skeið aftrat.

Felagsformansval er triðja hvørt ár í Fiskimannafelagnum.

## Smáur toskur á marknaðinum

**Støstu ráfiskanøgdirnar, sum Fiskamarknaður Føroya selir í løtuni, eru toskur 4, sum í gjár hevði ein miðalprís á 10,65 krónur fyri kilo.**

FISKAMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*At toskurin er við at taka seg uppaftur, sæst á landingarnøgdunum hjá skipum og bátum*
Mynd: Vilmund Jacobsen

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár tilsamans 75,7 tons av fiski fyri stívliga 1,1 miljónir krónur. Hetta gevur ein miðalprís fyri øll fiskasløgini upp á 14,60 krónur fyri kilo.

Størstu nøgdirnar vóru av toski 4, sum fóru fyri miðalprísin 10,65 krónur. Toskur 3 fór fyri miðalprísin 15,50, og hægsti toskaprísur í gjár var 25,50 krónur fyri kilo.

Eini 10 tons av hýsu vórðu eisini seld á Fiskamarknaði Føroya í gjár, og miðalprísurin fyri bestu hýsuna var 12,04 krónur.

Nøkur tons vóru av havtasku, og besti miðalprísur fyri havtasku var 28,18 krónur.

### Lítil upsi

Lítil og eingin upsi fer um søluna hjá Fiskamarknaði Føroya. Upsin verður í staðin handlaður beinleiðis millum skip og virkir.

Nøkur fá hundrað pund vóru av upsa, og hesi fóru fyri 4 krónur fyri kilo.

Upsaprísurin liggur annar um einar 6-7 krónur fyri kilo – alt eftir, hvussu stórur og góður fiskurin er.